# Tríggjar bygdir í kommununi

Fuglafjarðar kommuna gjørdist sjálvstøðug kommuna tann 01. august 1918 eftir at bæði løgting og landsting høvdu tikið endaliga avgerð. Tá kommunan gjørdist sjálvstøðug var fólkatalið 624, umfatandi bygdirnar Fuglafjørður og Hellur. Grundað á stórt vinnuligt virksemi vaks kommunan skjótt, so fólkatalið í 1930 varð 780, í 1942 976, í 1950 1227, í 1960 1267, í 1970 1380 í 1980 1599, í 1990 1643, í 2000 1547 og í 2005 1567. Í 1985 varð so fyrsta niðursetingin á Kambsdali veruleiki, so Kambsdalur sum bygd eftir hetta kom at verða partur av kommununi. Hóast fólkatalið 1978 fór yvir tey 1500, sum er lægsta mark fyri eini býarkommunu eftir táverandi kommunustýrislóg, so gingu heili 15 ár, til kommunustýrið tók avgerð um at heita á Føroya landsstýri um at fáa býarheiti. Henda avgerðin varð endaliga staðfest í juni 1993.

# Eingin rundkoyring hesuferð

Fuglafjørður: Arbeitt verður í løtuni við at íbinda vegastrekkið millum Traðarveg og Norður í Gerði og tvørturum Skarðsá. Hvussu hetta arbeiðið skuldi gerast, fekk kommunan trý uppskot um, harav eitt teirra hevði eina rundkoyring. Á fundi herfyri varð kortini ikki samtykt at taka við hesum uppskotinum, men einum uttan rundkoyring, samstundis sum atkoman til skúlan verður flutt. Samlaði kostnaðurin er mettur til góðar 1,4 mió krónur.

# nakað nýtt



*Varmakelda verður í Fuglafirði um vikuskiftið. - Skráin í ár er stórt sæð tann sama sum í 2006, sigur Vónbjørt Olsen, sum er ein av fyriskiparunum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Eitt verður kortini ikki á stevnuni í ár, og tað er ferðin út á sjálva Varmakeldu. Hetta tiltakið verður ístaðin inni í býnum.

Kapproðurin verður sjálvandi á skránni leygardagin. Og fyri fuglfirðingar verður hetta ein spennandi seinnapartur, nú lív av álvara er við at koma aftur í kapproðrarfelagið í býnum.

– Nevndin í felagnum hevur gjørt eitt gott arbeiði, og er av álvara farin undir at fáa kapproðurin at menna seg aftur, sigur Vónbjørt.

## Veðrið hevur alt at siga

**Eitt er at leggja skránna til rættis. Eitt heilt annað er, hvussu veðrið skikkar sær. Her kunnu fuglfirðingar tíverri staðfesta, at veðrið hevur als ikki verið teimum til vildar tey seinastu árini. – Nei, veðrið hevur verið bedrøviligt á fýra teim seinastu stevnunum. Og tað er ikki júst slíkt, sum ger at fólk fer á stevnu. – Eg haldi, at vit treingja til eitt vikuskifti við góðum veðri, sigur Vónbjørt Olsen.**



*- Eg havi einki ímóti festivalunum, men tað vísir seg at vera truplari at fáa fólk á bygdastevnurnar, sigur Vónbjørt Olsen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

at stevnurnar líkjast rættiliga nógv, og at tað er ringt at finna uppá nakað sum onnur ikki hava á síni skrá, sigur hon.

### Alt tað vanliga

Hóast hesi heldur døpru útlitini, hevur tað ikki hildið fyrireikarunum aftur í at leggja eina fjølbroytta skrá til rættis.

Stevnan í ár fer at innihalda alt tað, sum ein stevna skal: Fólkafund, midnáttarsamkomu, felagssang, møtir, ítrótt, dans, tivoli og alt hitt.



*Eitt samstarv millum ÍF, GÍ og LÍF kundi verðið øllum feløgunum at gagni*
*(savnsmynd)*

# Rætt at leggja fótbóltin saman

**Fuglafjørður:** Eitt evni sum fleiri helst fara at hava á orði um vikuskiftið, er fótbólturin.

Í løtuni eru trý stór fótbóltsfeløg í økinum, og nú er spurningurin komin um ikki rættast hevði verið at lagt ÍF, GÍ og LÍF saman í eitt einstakt og sterkt felag.

Ein av teimum sum er talsmaður fyri hesum, er Signar á Brúnni í Fuglafirði.

Hansara hugsan er, at tann nógvi peningurin í feløgunum kring landið ger sítt til, at tað eru tey størru feløgini sum eiga alt, meðan tey smærru feløgini verða við sviðusoð.

– Skilagott hevði tí verið at tosa saman um, hvussu ÍF, GÍ og LÍF kunnu samstarva í framtíðini, - eitt samstarv, ið øll ítróttarfeløgini kundu fingið nakað burtur úr, sigur Signar á Brúnni, nú varmakeldan stendur fyri stavn.

Ein atkvøðugreiðsla, sum Norðlýsið skipar fyri á heimasíðu sínari, bendir eisini á sama borðið. Klokkan 11 í morgun høvdu 29 fólk atkvøtt, og av hesum søgdu sløk 70 % ja og 20 noy, meðan 10 % ikki hava tikið støðu.

# Kommunan skal mennast

**Fuglafjørður: -** Nú skal eitt fólk setast til at taka sær av tí vaksandi talinum av málum innan menning av kommununi og av málum innan skúla- og mentanarøkið í kommununi.

Tað hevur býráðið í Fuglafirði samtykt, og lýsir í hesum døgum eftir einum menningar- og mentanarleiðara.

Høvuðsuppgávan hjá hesum nýggja leiðaranum verður m.a. at menna lokala vinnulívið og handilsvirksemið í býnum og at umsita tey mál, sum verða løgd út til kommununar at umsita, tá talan er um fólkaskúlan og frítíðarundirvísingina.

Viðkomandi skal somuleiðis verða við til at samskipa tiltøk í Mentanarhúsinum í tøttum samstarvi við nevndina í sjónleikarfelagnum, og skal haraftrat fyriskipa ávís hátíðarhald, vinarbýarsambond og orða tey mentanarpolitisku stevnumiðini í kommununi.

Til tann, ið settur verður verða sett ávís krøv, m.a. at viðkomandi skal vera framtakshugaður, samstarvshugaður, loyalur, tollyntur og hava leiðaraevni, og skal hava eina miðallanga útbúgving ella samsvarandi førleikar.

– Vit kunnu bjóða viðkomandi eitt spennandi umhvørvi, verður sagt.

Umsóknarfreistin er sett til 20. juli og er ætlanin at viðkomandi skal byrja í starvinum 1. september.